# Dukkurnar hjá mær vóru altíð sjúkar

*– so langt aftur eg kann minnast, havi eg ynskt at verið sjúkrasystir, sigur Jóna Lindenskov, sum í dag hevur 45 ára starvsdag sum sjúkrasystir*




JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

Hon hevur hildið í hondina á túsundtals føroyingum, sum eru sovnaðir, áðrenn teir verða lagdir undir skurð og hon hevur eisini verið hjá teimum, tá teir eru vaknaðir aftur. Hon hevur verið hjástødd tá feigdin hevur gjørt um seg á sjúkrahúsinum og hon hevur sanniliga eisini verið hjástødd tá undrini og gleðiligar hendingar eru farnar fram.

Og nú gevst hon, 63 ára gamla Jóna Lindenskov, ið sum ung genta kom úr Fuglafirði til Havnnar og síðan til Danmarkar, fyri at læra til sjúkrasystur, ein ynskidreymur hon hevur havt so langt aftur hon kann minnast. Frá 1. oktober fer hon at royna seg sum ungur pensionistur.

– Hjá mær vóru dukkurnar altíð sjúkar, tað var ongantíð ivi inni í mær sjálvum, hvat eg vildi verða, tá eg varð stór. Eg vildi vera sjúkrasystir og tað havi eg nú verið í 45 ár. Eg eri 63 ára gomul nú, og tað er helst best at gevast meðan væl stendur til. Tað er ikki av heilsuávum ella øðrum orsøkum, at eg gevist 1. oktober, sigur Jóna Lindenskov.

Jóna arbeiðir á narkosudeildini á landsjúkrahúsinum og í dag verður móttøka hildin á landssjúkrahúsinum í samband við starvsdagin.

# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:** Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið leygardagin:** Lot til andøvsgul av norði og sólglottar, men kanska okkurt ælið fyrrapartin. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:** Fleyr til lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Út á seinnapartin frískar hann vindin av suðri. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:** Gul til stívt andøvsgul av suðri og møguliga regn. Hitin millum 9 og 12 stig.




Lágtrýstið vestanfyri Skotland fer í landsynning og hátrýstið í útsynning úr Íslandi kemur móti Føroyum.




Hátrýstið sunnanfyri Ísland verður yvir Føroyum sunnunáttina og gevur góðveður um vikuskifti.




**Hitalagið mált frá 30./08. kl 06[00]–31./08. kl 06[00]. Hitin í gjár: 17,7°C**
Minsti hiti máldur í august: **0,2°** Mesti hiti máldur í august: **22,0°**




Avfallið: 0,2 mm – **mált frá 30./08. kl 6[00]–31./08. kl 06[00]**
Avfallið higartil í august: 83,3 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 20 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannahavn | 18 |
| Helsinki | 18 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 20 |
| Warzawa | 22 |
| Kiev | 18 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 27 |
| Malta | – |
| Tunis | 34 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | – |
| New York | 23 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 28 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 11 |

## Vestfalskyrrindi

27. aug.: Mánin næstur jørðini
29. aug.: Tendring
5. sept.: Fyrra kvarter
8. sept.: Mánin longst frá jørðini

Kelda: Skipalistin 2000

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. sept. | 09.08 | 21.26 | 08.08 | 20.26 | 08.23 | 20.41 | 11.08 | 23.26 | – | 12.08 | 07.23 | 19.41 | 06.23 | 18.41 | 09.23 | 21.41 | 10.23 | 22.41 | 08.53 | 21.11 | 10.08 | 22.26 |
| 2. sept. | 09.45 | 22.03 | 08.45 | 21.03 | 09.00 | 21.18 | 11.45 | – | 00.26 | 12.45 | 08.00 | 20.18 | 07.00 | 19.18 | 10.00 | 22.18 | 11.00 | 23.18 | 09.30 | 21.48 | 10.45 | 23.03 |
| 3. sept. | 10.23 | 22.43 | 09.23 | 21.43 | 09.38 | 21.58 | 00.03 | 12.23 | 01.03 | 13.23 | 08.38 | 20.58 | 07.38 | 19.58 | 10.38 | 22.58 | 11.38 | 23.58 | 10.08 | 22.28 | 11.23 | 23.43 |
| 4. sept. | 11.06 | 23.29 | 10.06 | 22.29 | 10.21 | 22.44 | 00.43 | 13.06 | 01.43 | 14.06 | 09.21 | 21.44 | 08.21 | 20.44 | 11.21 | 23.44 | – | 12.21 | 10.51 | 23.14 | – | 12.06 |


Grannskoðan • Ráðgeving
Bókhald • Skattamál
- og annað



RASMUSSEN & WEIHE
STATSAUTORISERAÐ GRANNSKOÐARAFELAG P/F
An associated firm of PricewaterhouseCoopers
Á GLAÐSHEYGGI - BOX 30
FO-110 TÓRSHAVN - P/F NR. 267
TEL. (+298) 311017 - FAX (+298 311018)
e-mail: rasmussen@rasmussen.fo
Heimasíða: www.rasmussen.fo
Sosialurin - 311820

Sp/f V.V.S. Hornið
Lágpríshandil
Alt innan hitaverk & sanitet so sum:
Stoypijarnsketil • Sanitet
Kranar • Baðirúmsmøblar
Støkk inn á gólvið ella ring:
Landavegur 2, Tórshavn
Tlf. 318023/Fax 310963
Runavík tlf. 447773
Opið er í Runavík
mikudag kl. 13-17.30
og leygardag kl. 10-14.

BINGO
Vit senda um alt landið
Bingoblokkar
Bingotrumlur v/ tilh.
El-bingomaskinur
v/ skermi
Bingotýssar
Lutaseðlar
Skava og vinn
o.m.a.
BINGO IMPORT
Tel. 45 68 68
Fartel. 22 52 00
Hvønn dag
Sosialurin - 311820

Sig tað uttan rokning



Føroya Tele kann nú bjóða tær eina heilt nýggja tænastu til tína GSM fartelefon, ið kallast Føroya Teletíð.

Kom inn í eina av Telebúðunum og hoyr meira um, hvussu tú sleppur undan telefonrokningunum...

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo
petur & petur • 320870